# Tónleikasending til útbjóðingar

**Arbeiðsheiti:** Country
**Miðil:** Útvarp/heimasíða
**Hvat:** Ein vikulig tónleikasending í vetrarskránni 2021/2022, t.e. frá september 2021 til 1. juni 2022
**Longd:** 50 minuttir
**Innihald:** Countrytónleikur
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionell ábyrgd:** Mentan

## LÝSING

Talan er um eina vikuliga tónleikasending við countrytónleiki. Sendingin skal í vetrarskránni fevna um allar sjangrur innan countrytónleik, umframt nýggjan og eldri countrytónleik.

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Gott føroyskt mál, góða útvarpsrødd og holla vitan um countrytónleik.

## KRØV TIL TILBOÐIÐ

Eina lýsing av, hvussu tú kundi hugsað tær at lagt sendingina til rættis. Tað veri seg tónleikavalið, hvussu sendingin skal byggjast upp og tín vertsleiklut.

## KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Upptøkuhøli
- Atgongd til savn
- Keyp av countrytónleiki
- Útgerð
- Ljóðtøkning
- Redaktør

## LØN

Løn/samsýning verður latin sambært avtalu.

KVF tilskilar sær rættin til at leggja dent á yrkisføri og veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rættin til at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram til at gera sendingina er 20. august 2021.

Umsókn skal sendast til teldubústaðin:
utbod@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum.
Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.